## § 21. Ásetingar fyri umráðispart E1 í 3. grundumráði

1 Umráðispartur verður lagdur til neystabygging, sum lutvíst kann innrættast til frítíðarhús, og smábáta-, frítíðar og ítróttarvirksemi, ið hevur við sjógvin at gera.

Í sambandi við neystaøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar ella smærri vinnuvirki, ið natúrliga hoyra økinum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum neystaøki og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2 Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina reglugerð um flokking av virkjum, sum ásetir fjarstøðu, ið mett verður at vera neyðug millum viðkomandi virkir og bústaðarøkir. Hendan reglugerð er góðkend av býráðnum 19. februar 2009 mál nr. 2007-1253

3 Bygging skal staðsetast soleiðis at atkoma framvið sjóvarmálanum verður tryggjað almenninginum.

4 Minst loyvda grundstykkjavídd er $20m^2$

5 Samanbygd bygningsrond kann í mesta lagið vera 35 m til longdar.

6 Byggjast skal so skjøldrar venda móti sjónum.




7 Skjøldrar skulu vera millum 3 og 5 m breiðir.

8 Hús skulu byggjast við mønu.

9 Hús skulu ikki vera hægri enn 5 m til hægsta punkt við útvegg og 7 m til mønuna.

10 Takhallið skal vera millum 35-50 gradir.

11 Framsíður og skjøldrar skulu vera úr betongi, gróti ella viði og kunnu klæðast við rukkublikki og/ella viði. Tekjur skulu vera úr rukkublikki, timbur ella vera flagaðar.

12 Býráðið kann víkja frá ásetingum í stk. 6, 7, 8, 9, 10 og 11, um heildarætlan verður gjørd fyri natúrligt avmarkað øki.

Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir) bygging, dámin í økinum o.a.

13 Treytin fyri at loyva frítíðarhúsi í neysti er, at umstøður skulu vera at hava bát í neystinum, og innrættingin til frítíðarhús ikki er á niðastu hædd, umframt at nøktandi rýmingarmøguleikar skulu vera eftir galdandi reglum.

14 Um køks-, vesi- og /ella baði-viðurskiftir verða í tí bygda, skal frárensl leiðast burtur sambært galdandi lógarásettum treytum, og ber neystaeigarin allar útreiðslur av hesum. Um kommunal spillvatnsleiðing er í økinum, stendur neystaeigarin fyri, og rindar allar útreiðslur fyri at leiða spillvatnið frá neystinum í kommunalu spillvatnsleiðingina.

15 Um neyðugt verður at uppseta/íbinda pumpuskipan fyri at leiða spillvatni í kommunalu spillvatnleiðingina, ber neystaeigarin allan kostnaðin av útbúnaðinum og rakstrinum av hesum.

16 Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina skeltisreglugerð, góðkend av býráðnum 19 september 2024 mál nr. 22/02144

| | Tænastu-skelti | Lýsingar-skelti | Vinnu- og stovnsskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

## § 22. Ásetingar fyri umráðispart E2 í 3. grundumráði

1 Umráðisparturin verður lagdur til smábáta-, vinnu-, frítíðar- og ítróttavirksemi, ið hevur við sjógvin at gera, og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.

Í sambandi við øki til smábáta- og frítíðar og ítróttavirksemi kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar og vinnuvirki, ið natúrliga hoyra økinum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2 Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-4 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina reglugerð um flokking av virkjum, sum ásetir fjarstøðu, ið mett verður at vera neyðug millum viðkomandi virkir og bústaðarøkir. Hendan reglugerð er góðkend av býráðnum 19. februar 2009 mál nr. 2007-1253

3 Bygging skal staðsetast soleiðis at atkoma framvið sjóvarmálanum verður tryggjað almenninginum.

4 Minst loyvda grundstykkjavídd er $20m^2$

5 Samanbygd bygningsrond kann í mesta lagið vera 35 m til longdar.

6 Byggjast skal so skjøldrar venda móti sjónum.

7 Skjøldrar skulu vera millum 3 og 5 m breiðir.

8 Hús skulu byggjast við mønu.

9 Hús skulu ikki vera hægri enn 5 m til hægsta punkt við útvegg og 7 m til mønuna.




10 Takhallið skal vera millum 35-50 gradir.

11 Framsíður og skjøldrar skulu vera úr betongi, gróti ella viði og kunnu klæðast við rukkublikki og/ella viði. Tekjur skulu vera úr rukkublikki, timbur ella vera flagaðar.

12 Býráðið kann víkja frá ásetingum í stk 6, 7, 8, 9, 10 og 11, um heildarætlan verður gjørd fyri nátúrligt avmarkað øki.

Natúrligt avmarkað øki í mun til lendi, skap, mørk (t.d. vegir) bygging, dámin í økinum o.a.

13 Um køks-, vesi- og /ella baði-viðurskiftir verða í tí bygda, skal frárensl leiðast burtur sambært galdandi lógarásettum treytum, og ber eigarin allar útreiðslur av hesum. Um kommunal spillvatnsleiðing er í økinum, stendur eigarin fyri, og rindar allar útreiðslur fyri at leiða spillvatnið frá bygninginum í kommunalu spillvatnsleiðingina.

14 Um neyðugt verður at uppseta/íbinda pumpuskipan fyri at leiða spillvatni í kommunalu spillvatnleiðingina, ber eigarin allan kostnaðin av útbúnaðinum og rakstrinum av hesum.

15 Loyvd skelting í hesum umráðisparti er sum víst á talvu niðanfyri og sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu

| | Tænastu-skelti | Lýsingar-skelti | Vinnu- og stovnsskelting |
|---|---|---|---|
| Aktiv skelting | | | |
| Passiv skelting | x | | x |

Tórshavnar kommuna hevur gjørt eina skeltisreglugerð, góðkend av býráðnum 19 september 2024 mál nr. 22/02144